18 DAGAR Løgtingsvalið 2008

LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Framtíðar eldrarøkt
## soleiðis skulu vit skipa framtíðar eldrarøktina í Føroyum



Val X
HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður
Javnaðarflokkurin

**Tørvurin á eldrabúplássum nøktast:**
Enn nøkur ár aftrat er fremsta uppgávan at loysa sjálvan kjarnutrupulleikan í eldrarøktini: at útvega búpláss til øll teirra sum hava tørv á tí. Í hesum samgonguskeiði eru 157 nýggj pláss komin aftrat. Men enn langt eftir á mál í ávísum økjum, og tí eru tilsøgnir givnar til bygging av 132 eldrabúplásum aftrat tey fyrstkomandi árini.

**Nútíðargerð av tí gamla:**
Í 2010 skal tørvurin á eldrabúplássum um alt landið vera nøktaður, so at farast kann undir næstu uppgávuna, at dagføra/útskifta tey gomlu ellis- og røktarheimini og sambýlini, sum vóru bygd í eini farnari tíð, og sum als ikki lúka nútíðar krøv.

**Betri tænasta til heimabúgvandi:**
- Fleiri ressursir skulu til Heimatænastuna at arbeiða við, so tørvurin hjá einstøku brúkarunum kann verða betri nøktaður enn í dag
- Økisterapiin skal skipast um alt landið og styrkjast, so gomul fáa betri møguleikar fyri øktum likamsvirkni og venjingartilboðum.
- Døgnvakt skal skipast um alt landið, so heimabúgvandi eisini kunnu fáa hjálp um kvøldið og náttina.
- Mattænastan skal leggjast undir heimatænastuna, so øll gomul kunnu fáa tilboð um góðan kost.

**Dygdin á eldraheimunum skal lyftast:**
Eldraheimini skulu hava fleiri ressursir, so tænastan til búfólkini verður betri, og so tey kunnu skipa virksemið eftir Eden-háttinum:
- Størri trivnaður á sambýlum og røktarheimum við at broyta tey frá stovnum, stýrdir eftir óliðiligum starvsfólkaskipaðum mannagongdum - til eldraheim, har gerandisdagurin er tillagaður ymiska tørvinum hjá búfólkunum.
- Búfólkini luttaka í tilrættalegging og útinning av dagliga virkseminum, matgerð, reingerð, undirhaldi o.ø. aktivitetum.
- Persónligi integriteturin skal virðast við at tey ikki takast av ræði.
- Samband við skúla og dagstovnar, so ættarliðini kunnu bindast saman, fyri at skapa virðing og forstáilsi fyri hvørjum øðrum
- Samband við djór, urtagarðsarbeiði, umhvørvið í bygdini, fólk og náttúru.

**Umsorganararbeiði lokalt trivnaðartiltak:**
Umsorganararbeiði skal umskipast, so dagtilhaldini verða lokal kommunal trivnaðartiltøk, meðan mattænastan verður skipað sum eitt tilboð frá heimatænastuni

**Sertænastur fyri eldri fólk við serligum tørvi:**
Millum tey eldru eru nógv, sum hava ein serligan tørv enn bert ein vanligan røktartørv. Neyðugt er at menna sertænasturnar til hesar ymisku bólkarnari:
- Demensøkið: umfram dagtilboð skal ein størri partur av búplássunum úti í økjunum skipast fyri dement, og tænastan skal styrkjast fakliga við at skipa serligt ráðgevandi demens-toymi.
- Gerontopsykiatri: til eldri sálarsjúk skulu skipast bútilboð úti í økjunum, fyriskipað av heimatænastuni. Tænastan til eldri sálarsjúk skal mennast fakliga við serligum gerontopsykiatriskum toymi. Fyribyrging móti tunglyndi hjá eldri skal vera samskipað átak fyri heimatænastu, økispsykiatri og kommunulæknaskipan.
- Eldri menningartarnað: menningartarnað verða eisini røktarsjúklingar, og mugu tí serstøk bútilboð og serstakar tænastur skipast til teirra úti í økjunum.
- Eldri misbrúkarar hava serstakan tørv á røkt, sum røkkur útum vanligu heimatænastuna. Tí má ein serstakur innsatsur á hesum øki fyriskipast.

**Menning av føroyskari eldrafrøði:**
Faklig serfrøði og gransking á eldraøkinum, sum ikki er í dag, skal uppbyggjast: Gerontologi, um broytingarnar, sum henda við okkum sohvørt vit eldast, og Geriatri, um eldrasjúkur og eldraheilsurøkt.

**Bygnaðarligur reformur av eldrarøktini:**
Í staðin fyri negativu sundurliðingina av eldrarøktini í dag millum heimarøkt, sjálvsognarstovnar, kommunalar og landsmyndugleikar, skal fremjast ein skipanarlig integratión ella samansjóðing av allari eldrarøktini, tvs. heimatænastuni til heimabúgvandi og øllum ellis- og røktarheimum og sambýlum, so at tað í einstøku økjunum verður ein eldrarøkt, ein integreraður rakstur, viðv. visitatión, tilrættalegging, virksemis- og ressursustýring.

**Lógarfesting av eldrarættindum:**
Ein serlig eldralóg skal gerast sum rammulóg um tilboð og rættindi, sum myndugleikarnir skulu tryggja teim eldri. Samstundis skal gerast ein serlig rammulóg, sum regulerar virksemið á eldraheimunum.

**Fíggjarlig javnseting:**
Fíggjarligi ójavnin millum búfólk á ellis- og røktarheimum og á sambýlum skal burtur. Búfólkini skulu hava alla sína pensjón útgoldnað og heldur gjalda fyri veittar tænastur.

**Fjølbroytni í eldraíbúðum:**
Frá standardiseraðum eldrabúplássum til størri fjølbroytni í menningini av bústaðartilboðum til eldri, so tað verður tikið nógv størri fyrilit fyri persónligum ynskjum, so sum egnar eldraíbúðir, lutaíbúðir sum vardar íbúðir, umframt sambýli og røktarheim.

**Aktivering av eldri og avvarandi:**
Tey eldru og teirra avvarandi skulu kunna luttaka sum ein aktivur partur í tilrættaleggingini og fyriskipanini av eldratænastunum á staðnum.
Brúkararáð skulu skipast við einstøku heimini.
Eldraráð skulu skipast fyri heildarvirksemið hjá eldrarøktini í einstøku økjunum.

**Starvsfólk og faklig menning:**
Ein av størstu avbjóðingunum í eldrarøktini er at tryggja nøktandi fakligar og trivnaðarligar umstøður fyri øll tey, sum nú starvast í eldrarøktini, og fyri at kunna rekruttera tær nógvu góðu hendir, sum brúk verður fyri aftrat í komandi árum.
Uppgradering av røktarfakliga økinum: betri útbúgvingartilboð við sjúkrarøktarfrøðiútbúgving á bachelorstigi, sum eisini má standa verandi starvsfólkum í boði við eftirútbúgvingarmøguleikum.
Nýggjur almanna- og heilsuskúli, sum eitt meira attraktivt útbúgvingartilboð fyri heilsurøktarar og heilsuhjálparar.
Upplyfting av fakliga yrkinum: eins og í heilsuverkinum skulu fakligu mørkini í Nærverkinum flytast uppeftir í yrkisligum funktiónum millum fakbólkarnar.

**Kompetansur og trivnaður:**
Rúmligari skipan av røktarøkinum: sohvørt tørvurin av eldrabúplássum verður nøktaður, skal hetta geva rúm hjá heimatænastuni fyri betri arbeiðsumstøðum, eins og bygnaðarliga integratiónin av allari eldrarøktini skapar betri møguleikar fyri fyriskipan av uppgávunum.
Breiðari fakligar kompetansur og størri trivnaður í starvsvirkseminum við at arbeitt verður eftir sonevnda Eden-háttinum, og størri dentur verður lagdur á fólkaheilsupolitisk mál, um at stimbra einsvæl kropsliga sum andliga førleikan hjá teimum eldru. Eisini eigur at vera latið upp fyri øðrum fakligum kompetansum, sum t.d. pedagogiskum, inni á hesum arbeiðsøkinum.

# Íverksetan - Tá tað regnar á prest so dryppar á degn



Val X
KITTY MAY ELLEFSEN
Fólkaflokkurin

**Føroyar skulu mennast til at vera eitt áhugavert stað hjá virkisfúsum fólki at byrja vinnu**
Hugburður fólksins um íverksetan og íverksetarar ávirkar hug tess at ganga hesa leið. Í summum londum verða fólk frá barnsbeini eggjað til at gerast íverksetarar, og lagt verður í tey, at íverksetarar eru slóðbrótarar og fyrimyndir. Soleiðis hevur ikki verið í Føroyum sjálvt her altíð hevur búleikast kreativ fólk, sum væl hava duga at brotið upp úr nýggjum.

**Fólkaskúlin**
Fólkaskúlin átti at tikið íverksetan íálvara. Ikki tí, at næmingar frá fyrsta klassa skulu læra, at gera handilskvinnur/menn. Men í fólkaskúlanum skulu næmingar læra at arbeiða skipað við nýskapan í øllum lærugreinum. Í fólkaskúlanum skal dentur verða lagdur á íverksetan við verkætlanum, evnisdøgum og íverksetaraspølum ella við kappingum.

**Miðnámsskúlar**
Í miðnámsskúlanum skulu allir næmingar hava tilboð um frálæru í íverksetan. Í løtuni útbjóðar Handilsskúlin og Tekniski skúli lærugreinina “ungt virki”. Hetta hevur eydnast væl og dáma næmingar stak væl hesa lærugrein.
Mentamálaráðið eigur at arbeiða fyri, at lærarar á miðnámsskúlunum, sum undirvísa í íverksetan fáa neyðuga eftirútbúgvingina. Í lógum og kunngerðum skal standa, at miðnámsskúlin er við til at menna íverksetanarkunnleikan hjá næminginum.

**Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg**
Í Danmark hevur stjórnin eftir 4 árum klára, at broytt hugburðin, hjá dømum, mótvegis íverksetarum. Ímeðan tað fyri sløkum 4 árum síðani als ikki var kool, at skapa sín egna vinnuveg er tað í dag nakað man sær upp til. Hetta hevur danska stjórnin gjørt við miðvísum tiltøkum.
Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlit fyri at vinna pening vera góð. Vit skulu líta á orðataki: “ Tá tað regnar á prestin so dryppar á deknin”. Við øðrum orðum, tá ið íverksetarin hevur góð kor og klára seg væl so gongur eisini væl í samfelagnum sum heild.
Eg vil arbeiða fyri betri korum hjá vinnulívinum og íverksetarum í Føroyum.

# Eg vil bert hava gjøgnumskygni



Val X
HEÐIN D. POULSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Poul Michelsen hevur fingið ilt av einari almennari viðmerking hjá mær um, at eg vil hava gjøgnumskygni um hvussu tey ymisku valevnini fíggja teirra valstríð, tí hetta aftursvar.
Nú havi eg ikki havt til vana at senda jólaheilsanir til Poul Michelsen, so hví hann tekur eina av teimum mongu almennu viðmerkingunum sum eg geri til sín, tað kann bert hann svara uppá.
Eg havi aldrin lagt Poul Michelsen undir at hava gjørt nakað sum helst og er einki undarligt í tí.
Mín boðskapur er tann, at tað skal vera fult gjøgnumskygni í øllum politiskum avgerðum, eisini í mun til hvussu flokkar og hvussu tey einstøku valevnini fíggja teirra valstíð, tað er tað ikki í dag.
Sum í okkara grannalondum, mugu reglar gerast, ið týðuliga áseta krøv til upplýsing hvar politiskir sponsor pengar koma frá.
At Poul roynir at arga vinnulívsfólk til at trúgva, at eg leggi tey og øll valevnir við egnum virki undir eitt og hvørt óheppið virksemi er bara for bíligt av honum, serliga tá havt verður í huga, at eg sjálvur havi egið virkið.
Eg fari at bjóða Poul Michelsen øðrum valevnum um at gera tað sama sum eg, og framleggja ein fullfíggjaðan roknskap av valstríðnum og í honum upplýsa hvar fíggingin kemur frá.
Meira um hetta og annað á www.hedindp.com